# Haldið fæst í tí, sum ger tykkum sermerkt!

**Á ráðstevnuni "Fóta Tær í London" vóru ráðini frá ensku serfrøðingunum, bæði innan móta og innan tónleik, at tað er tað, at vit eru føroysk, ið ger okkurt serlig, og hetta mugu vit ikki undirmeta.**

Funky Faroe Islands
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Føroysku luttakararnir tyktust á einum máli um, at tiltøkini týsdagin vóru sera gevandi*

Týsdagurin á føroysku ráðstevnuni í London var gevandi fyri føroysku luttakararnar. Fyriskipararnir høvdu sett saman eina sera góða skrá, við gestum av høgari góðsku. Umframt framløgur av Hilary Riva forkvinnu í British Fashion Council, ið m.a. stendur fyri mótavikuni í London, og Martin J. Asmundsen ráðgeva í vinnumálum við donsku sendistovuna í London, vóru tveir sera áhugaverdir pallborðsfundir á skránni.

Fyrrapartin var tað mótavinnan og hvussu tú sum føroyingur kann gera vart við teg á enska mótapallinum. Pallborðið var mannað av sera kompetentum fólki: Sniðgevanum Susan Brackhouse, ið sjálv hevur roynt at byrja egið virkið, og fingið virkið at yvirliva eisini eftir tey fyrstu árini. Hilary Riva, ið umfram at vera forkvinna í British Fashion Council hevur arbeitt við klædnasølu í eitt mannaminnið, Melanie Winning, ið er stylistur og make-up artistur og hevur arbeitt nógv í mótavinnuni, Sarah Musgrove, ið er strategiskur ráðgevi, og livur av at marknaðarføra sniðgevar og mótablaðkvinnan og sniðgevin av hundafrakkum Wendy Scott, ið eisini hevur skipað fyri hesum partinum av tiltakinum. Kjakið kom víða um, og nógv hugskot um hvussu føroyskur móti kann sláa í gjøgnum í London vóru havd á lofti. M.a. varð sagt, at vit ikki máttu gloyma hvussu forkunnug vit vóru. Okkara støða sum eitt land, ið eingin hevði hoyrt um, var ein áhugaverd søga, ið kundi brúkast, sum jarnbrot inn á enska marknaðin.

Seinnapartin var tónleikurin á breddanum, aftur hesaferð var eitt sera kompetent pallborð savnað, íslendska Anna Hildur Hildibrandsdóttir skipaði fyri hesum parti av ráðstevnuni, og hon hevði fingið: John Best, ið er royndur umboðsmaður í Onglandi, hann hevur m.a. verið umboðsmaður hjá The Verve og fleiri øðrum bólkum, í løtuni fer nógv av hansara orku til at vera umboðsmaður hjá íslendska bólkinum Sigur Rós, Christian Ulf-Hansen, ið m.ø. er umboðsmaður hjá Teiti, men hevur nógvar royndir úr tónleikaídnaðinum, Richard Laws, ið er sakførari fyri nógvar tónleikarar og plátufeløg, Nick Robbin, ið arbeiðir við nýggjum bólkum hjá plátufelagnum BMI og so Anna Hildur Hildibrandsdottir sjálv, ið m.a. hevur royndir sum tónleikaumboðsmaður og sum PR fólk í sambandi við Iceland Airwaves. Eisini hesin fundur var sera áhugaverdur, og her vóru ráðini aftur, at tað var týdningarmikið at halda fæst í tí sermerkta, ið ger okkum til føroyingar.

Dagurin endaði við, at eitt nýtt pallborð lurtaði eftir brotum úr ymiskum føroyskum løgum. Við tað pallborið sótu narkrir av teimum, ið eru við til at velja bólkar út til plátufeløg. Her vóru Stephen Bass, ið arbeiðir við at finna bólkar til Virgin Records, og áður hevur arbeitt fyri Islands Records og var við til at stovna óhefta plátufelagið Moshi Moshi Records, Garreth, ið starvast hjá CFD Management og Christian Ulf-Hansen, ið eisini luttók við fyrra pallborið.

Luttakarnir sluppu at hoyra tónleik við m.ø. Yggdrasil, Eivør, Marius, Høgna Lisberg, 200, Gestir, Makrel, Petur og Deja Vu. Skoðsmálini vóru einki serlig, men fleiri av bólkunum, vildu bæði Garreth Christian og Stephen hoyrt meira av. Lagi Morning Dew hjá Høgna Lisberg fekk nógv bestu skotsmálini.

Føroysku luttakararnir tyktust á einum máli um, at tiltøkini týsdagin vóru sera gevandi

---

# Føroyingar áttu at brúkt okkara ráðgeving

**Martin J. Asmundsen ráðgevi við donsku sendistovuna í London, heitti á føroysk virki um at brúka tær tænasturnar, ið danska handilsráðið veitur.**

Funky Faroe Islands
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




*Martin J. Asmundsen heldur, at Føroyar og Danmark áttu at kunna komið ásamt um eina loysn, har føroyingar kunnu brúka tænasturnar hjá danska handilsráðnum.*

Ráðgevin í vinnumálum við donsku sendistovuna í London Martin J. Asmundsen var ein av gestunum, ið luttók á ráðstevnuni í London í gjár. Asmundsen arbeiðiri undir danska handilsráðnum, The Danish Trade Counsil. Hann greiddi frá um arbeiðið hjá sær og sínum starvsfeløgum, við at ráðgeva og hjálpa donskum fyritøkum, ið royna at koma inn á enska marknaðin, og metti tað vera ein upplagdan møguleika hjá føroyskum vinnulívið brúka stóra kunnleikan, ið tey hava.

- Eg eri ikki greiður yvir hvussu tílíkt verður avroknað millum Føroyar og Danmark, men eg ivist ikki í, at tað átti at borið til, segði Martin J. Asmundsen.

Asmundsen greiddi frá, at tey hjálpa fyritøkum innan nógv ymisk virkisøki, ið royna at sleppa inn á enska marknaðin

- Vit ynskja at vera tann fyritrekti samstarvsfelagin hjá donskum vinnulívið í Bretalandi. Hetta verður millum annað gjørt við at ráðgeva, at gera marknaðarkanningar, at kanna trendir, at finna samstarvsfelagar, at finna framleiðslustøð uttanlands og mangt annað. Ein av veitingunum er 24 tímar av ókeypis coaching til virkir, ið hjálpir teimum at fyrireika seg til arbeiðið á bretska marknaðinum.

Danska handilsráðið hevur fólk og sendistovur kring alt Evropa, ið hjálpa fyritøkum við tílíkum arbeiði.

Virksemið hjá danska handilsráðnum hevur havt sera góð úrslit.

- Fyri hvørja brúkta krónu fáa vit 278 kr. í øktum útflutningi, so hetta er væl brúktur peningur, greiddi Asmundsen frá. Nøgdsemið hjá fyritøkunum, ið vit arbeiða saman við er sera høgt, 95% av okkara samstarvsfeløgum eru nøgdir við okkara virksemið, segði Asmundsen.

Eitt virkisøki, ið danska handilsráðið fæst við er mótaídnaðurin. Her gera vit eitt nú marknaðarkanningar, vit fara nú út í handlar og kannað hvat teir selja. Vit hjálpa eisini virkjum inn á mótaframsýningar, og skipa somuleiðis fyri onkrum mótaframsýningum saman við øðrum.

Harumframt eru vit farin undir at savna eina databasu yvir agentar, vit royna at gera eina gjølla databasu, við nógvum ymiskum upplýsingum, og vit brúka hesa til at matcha agentar við fyritøkur. Í løtuni telur databasan eini 3-400 agentar.

- Ráðgevingin liggur og bíðar eftir tykkum. Hetta er í ein ávísan mun galdandi fyri øll vinnuøki, men onkuntíð mugu vit melda pass, segði Asmundsen.